Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Tað er eitt alternativ

### *Oddagrein*

BÆÐI løgmaður og varaløgmaður afturvísa avgjørdir, at tað er eitt alternativ í løgtinginum til fullveldisætlan landsstýrisins. Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal siga, at landsstýrissamgongan stendur saman og at hon heldur fast um fullveldisætlanina og at evsta vald skal liggja í Føroyum. Høgni Hoydal fer so vítt sum at siga í sjónvarpinum, at ongin munur var á áskoðanini hjá Bjarna Djurholm og Helenu Dam á Neystabø og tí sum landsstýrið hevur sett sær fyri.

TEY, sum lurtaðu eftir orðaskiftinum um ólavsøkurøðuna, merktu sær fleiri ferðir, at tað vóru samgongulimir, sum ásannaðu, at við verandi strategi slepst neyvan víðari. Mælt varð m.a. til at venda gongdini á høvdið og henda áskoðan minti so nógv um uppskot Javnaðarfloksins um eina sjálvstýrislóg, at bæði Dimmalætting og Sosialurin ásannaðu, at í løgtinginum er eitt alternativ til offisiellu landsstýrisætlanina.

EITT er, hvat landsstýrið hevur felt í eitt samgonguskjal og hevur lagt sum grundarlag fyri samráðingum, men eitt annað er, hvat er realistiskt at koma ásamt um í samráðingum við eina danska stjórn, sum hevur læst seg fasta í eina stutta skiftistíð og sum helst ikki vil sleppa tí stóra territoriinum norðuri í Atlantshavi.

TÍ má landsstýrið helst leggja eina nýggja strategi – ella saðla um, sum Jóannes Eidesgaard hevur mælt til – um vit skulu taka nøkur verulig stig á sjálvstýrisleið.

HETTA má landsstýrið hava ásannað, tá varaløgmaður tengir tann ætlaða búskapargrunnin við skiftisætlanina. Ætlanin við búskapargrunninum er frálík, men støddin á grunninum kann neyvan koma upp í ta upphædd, sum landsstýrið hevur miðað eftir at fáa í eini 12-15 ára langari skiftistíð.

ORÐASKIFTIÐ í løgtinginum bendir á at tað er eitt alternativ til verandi fullveldisætlan. So er spurningurin, um kjarnin í landsstýrissamgonguni ásannar hetta, saðlar um og sleppur ætlanini um, at fullveldi skal proklamerast, áðrenn yvirtøkur og aðrar tillagingar verða gjørdar og ístaðin tillagar samfelagið í einum nýggjum sáttmála við Danmark áðrenn Føroya fólk tekur endaliga støðu til fult sjálvstýri.

*Sosialurin*

# Føroyskar gen-kanningar á ráðstevnu í Frankaríki

*Í fýra ár hava føroyskir og danskir granskarar arbeitt við eini gen-kanning, sum er gjørd við føroyskum genum. Úrslitini skulu nú leggjast fram á eini stórari sálarfrøðiligari gengranskingarstevnu*



*August G. Wang hevur havt høvuðsábyrgdina av gen-kanningini*

STEFAN Í SKORINI

Stevnan, sum føroysku granskararnir fara til, verður frá 26. til 31. august í Versailles beint uttan fyri París, og hon nevnist tann 8. heimsráðstevnan í sálarfrøðiligari gengransking. Ráðstevnan er annaðhvørt ár í USA og annaðhvørt ár í einum øðrum landi.

August G. Wang, sálarlækni, hevur høvuðsábyrgdina av kanningini, Hans Atli Dahl, molekylærbiologur, hevur arbeitt við blóðroyndunum í Danmark, og Ann Østerø, bioanalytikari, hevur savnað blóðroyndirnar inn í Føroyum. Eisini eru Maria Vang, lækni og Sofus Joensen, yvirlækni, við í verkætlaini. Hesi eru millum tey, sum fara á ráðstevnuna. Eini fimm granskarar úr Danmark verða eisini við. Tilsamans eru eini tíggju fólk tætt knýtt at verkætlanini.

Í Versailles skal úrslitið av teirra gransking leggjast fram, og eini 300 granskarar úr øllum heiminum verða kunnaðir um teirra verkætlan.

Her kunna aðrir granskarar eisini um síni úrslit, so at til ber at síggja, hvussu langt aðrir eru komnir innan sálarfrøðiliga gengransking.

- Endamálið er at samskifta við aðrar granskarar og lúra eitt sindur eftir, hvussu arbeiðshátturin hjá øðrum arbeiðsbólkum er. Vit vilja eisini vísa, hvørjum øki vit arbeiða á, so at aðrir vita, hvussu langt vit eru komin, sigur Hans Atli Dahl, ið er cand.scient í biologi.

Eisini vil tann føroyski bólkurin vekja áhuga millum granskarar úti í heimi fyri gengransking í Føroyum, tí Føroyar eru eitt sera áhugavert øki at gera genkanningar í.

**Byrjaðu í 1996**

Verkætlanin fór í gongd í 1996, tá ið tær fyrstu blóðroyndirnar vórðu tiknar í Føroyum, og nú fyriliggur eitt úrslit. Granskararnir hava arbeitt á ymiskum støðum í Danmark. Nevnast kann, at yvirlitskanningarnar eru gjørdar á Odense Universitetssjúkrahúsi, meðan greiningin og hagtølini hava verið gjørd í Århus.

Henda granskingin snýr seg bara um sálarligar sjúkur, har føroyskir sjúklingar og teirra foreldur hava latið blóðroyndir. Tilsamans er talan um eini 250 blóðroyndir, sum arbeitt verður við. Blóðroyndir verða ikki tiknar av øðrum í familjuni enn foreldrunum.

- Vit hava fingið blóðroyndir frá sjúklingum og foreldrunum, so at vit kunnu síggja, hvør partur av genunum er givin víðari, tí at foreldrini eru í flestu førum frísk fólk, og so ræður um at finna ein samanhang, sigur Hans Atli Dahl.

Hans Atli Dahl sigur eisini, at søguliga verður farið longri aftur við at kanna, um onnur í familjuni hava havt somu sjúku, so at vísast kann á, nær sjúkan kom í familjuna.

Hugsað verður fyrst og fremst um tær fimm sálarsjúkurnar skizofreni, alkoholismu, manio-depressión, autismu og panikangist. Arbeitt hevur verið við eini 10 til 20 sjúklingum innan hvørja sjúku og foreldrum teirra. Uppgávurnar eru býttar millum granskararnar, so at ein bólkur tekur sær av hvørjari sjúku. Bólkurin hjá Hans Atla Dahl hevur fyrst og fremst arbeitt við panikangist.

**Bara føroysk gen**

Í verkætlanini hava granskararnir bara arbeitt við genum frá føroyingum.

- Tað týdningarmesta við hesi kanningini er júst tað, at bara føroyingar eru við. Tað, sum vit royna, er tað finna eitt genetiskt isolat í Føroyum.

- Vit hava verið avbyrgd í so langa tíð, og arvaílegan hjá flestu føroyingum stavar frá nøkrum heilt fáum fólkum, sum komu her á fyrstan tíð, tað ger Føroyar so sera áhugaverdar, sigur Hans Atli.

- Vit leita eftir veruligum sjúkugenum, ikki eftir variantum av frískum genum. Sjúkugenini eru lættari at finna í avbyrgdum fólkasløgum sum føroyingum, sigur Hans Atli.

Kanningin hevur til endamáls at vísa á eyðkend øki á tí genetiska arvastreinginum hjá fólki við somu sjúku, har orsøkin til sálarligu sjúkuna kann verða at finna. Um funnið verður fram til eitt øki, sum er øðrvísi hjá teimum sjúku, ber til at lesa, hvar á arvastreinginum sjúkugenið møguliga er at finna. Ikki ber enn til at vísa á eitt ávíst gen, haðani sjúkurnar stava.

**Einki einvíst úrslit**

Hans Atli Dahl leggur afturat, at í teirra bólki, sum arbeiddi við panikangist, komu tey ikki fram til nakað einvíst úrslit, tí ikki bar til at síggja nakað frávík í nøkrum genetiskum øki hjá teimum sálarliga sjúku í mun til tey frísku.

Roynt varð at flyta ein part av kanningini til Føroyar, men hetta lat seg ikki gera orsakað av vantandi peningaligum stuðli og vánaligum granskingarumstøðum, hetta er annars eisini trupulleikin hjá gengranskarum kring heimin.

Meira ber til at fáa at vita um ráðstevnuna á heimasíðuni www.socfi.fr.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust meg á 80 ára degnum 4. juli og gjørdu mær dagin ógloymandi, takki eg hjartaliga.

**Lotta Hjelm, Vágur**



# Apollinaris sum kranavatn

*Nú turkurin ger um seg, eru havnarfólk farin at drekka sodavatn ístaðin fyri kranavatn*

DIA MIDJORD

Tá veðrið er gott, merkist hetta á søluni hjá bryggjaríunum. Tískil er lagið gott á Føroya Bjór og Restorffs Bryggjarí, nú drúgt turrveður hevur ligið leingi.

Aftrat hesum er vatnið í Havn ikki drekkandi, so nú drekka fleiri sodavatn aftur við døgurðanum. Í hvussu so er, hava bryggjaríini seinastu tvær vikurnar havt óvanliga góða sølu av sodavatni, ið er líkt kelduvatni.

**Brúsandi søla**

– Hálvanannan liturs fløskurnar av Apollinaris eru útseldar í Havn og fáast ikki aftur fyrr enn mánadagin, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór.

– Nógv meira enn vanligt er selt, sigur Lena Mørk, stjóri á Restorffs Bryggjarí.

Á báðum bryggjaríunum hevur vanliga mannagongdin verið seinastu árini, at nógv er at gera fram móti ólavsøku. Síðani stilnar av, men soleiðis hevur tað ikki verið í ár.

– Nógv trýst er framvegis. Sølan er meir enn tvífaldað seinastu fjúrtan dagarnar, sigur stjórin á Føroya Bjór.

Á Restorffs Bryggjarí hevur Club Soda gingið sum heitt breyð seinastu dagarnar.

– Vit hava einki ímóti, at góðveðrið heldur sær eina tíð aftrat, leggur stjórin Lena Mørk aftrat.




*Á Føroya Bjór goymsluni í Havn vóru bert tveir kassar av apollinaris eftir fyrrapartin í gjár. Eins og club soda hjá Restorffs Bryggjarii verður hetta brúkt sum drekkivatn í Havn*

# Ferðast bæði skjótt og víða

*Sambært telduni hjá Dorethe Bloch, so er hvalurin ikki dovin. Hann ferðast onkuntíð einar 200 kilometrar um samdøgrið*

DIA MIDJORD

– Vit vóru ikki klár yvir, at grindahvalurin ferðast so nógv, men tað ger hann altso. 200 kilometrar er ómetaliga langt at fara eftir einum døgni, sigur Dorethe Bloch.

Hon verður framvegis uppringd av Mads Petur, sum enn ikki hevur spælt sær av við sendaran. Í gjáramorgunin lá hann stutt eystan fyri Føroyar.

Onkur hevur í skemti sagt, at hinir báðir hava verið ov tætt hjá Cantat-kaðalinum og gníggjað fyri at fáa samband aftur, men at hetta bert hevur elvt til stórar trupulleikar í telesamskiftinum hjá øllum øðrum.




